# Broytt skrá og nýggjar sendingar

**Mánadagin fer Útvarpið at seta í verk tær síðstu broytingarnar í sambandi við, at vetrarhálvan hjá ÚF byrjar**

VETRARSKRÁIN HJÁ ÚTVARPINUM
*Tíðindaskriv*

Tá verður senditíðin longd, og í vetur fer ÚF at senda til kl. 23.00 á kvøldi frá mánadegi til fríggjadag. Leygarkvøld verður sent til kl. 01.00, og sunnukvøld fer útvarpið at gevast kl. 21.00.

Nú verða fleiri av teimum góðu, gomlu vetrarsendingunum aftur at hoyra, sum eitt nú Heimabeiti, Viðurgerði, Tilvera, Fólk og Frítíð, Crescendo, Zip og Nón.

Barnaútvarpið byrjaði sína vetrarskrá fyri trimum viku síðani, og eins og undanfarna vetur verður barnaútvarpið sent aftur klokkan 18.00.

**Nógv nýtt á skránni**

Nógv nýtt verður eisini á skránni í vetur. Hvørt mánakvøld kl. 19.00 verður ein mentanarsending, sum fer at viðgera tað, sum í breiðum týdningi rørist í føroyskum mentanarlívi. Høgni Djurhuus og Leif Láadal fara at skipa fyri.

Útvarpið fer at seta eina bygdarsending aftur at á skránna. Reportasjurnar hjá Studio Pegasus og Suðurrás verða aftur á skránni, og harumframt verður farið undir eina reportasju úr Eysturoynni. Hesar sendingarnar verða at hoyra klokkan 17.05 mánadag, týsdag og hósdag.

Mikudag verður orðaskifti á skránni. Vikuskiftissendingin verða víðkað til tveir tímar fríggjadag seinnapart. Tað verða teir báðir Kári Sólstein og Suni Merkistein, sum fara at taka sær av henni.

Leygarkvøld verður spurnarkappingin aftur fastur táttur á skránni, og hon verður send hvørt leygarkvøld fyrru helvt av vetrinum.

Útvarpið hevur avgjørt at umskipa kvøldskránna soleiðis, at tímarnir millum klokkan 20.00 og 23.00 eru skipaðir í eina flatu, har litið verður aftur á útvarpsdagin saman við góðum tónleiki. Klokkan 22.00 verður sendingin Nón frá seinnapartinum aftur at hoyra.

Hetta eru bert nakrir fáir av teimum mongu tættunum, sum útvarpið fer at bjóða lurtarunum í vetur. Hvørja viku verður sent í 110 tímar, og útvarpsmanningin vónar við hesi vetrarskránni at kunna bjóða lurtarunum eina fjølbroytta, góða og undirhaldandi útvarpsskrá.

Nýggj vitan um toskin:

# Úr Vágahavinum og út á Suðuroyarbanka

**Tann 21. sept. 2004 lat Columbus eitt fiskamerki inn, sum var nummar 4723. Columbus hevði fingið tann merkta toskin á Suðuroyarbankanum (Mynd 1) dagin fyri. Hetta var ein sera áhugaverdur toskur, tí tað er sera sjáldsamt at fáa merktan tosk á Suðuroyarbankanum**



*Mynd 1 sýnir, hvar toskurin hevur ferðast*

MERKING AV TOSKI
*Petur Steingrund,*
*Fiskirannsóknarstovan*

Toskurin (70 cm langur) var merktur í Vágahavinum 20/3-2004 (síðst í gýtingini) við einum sokallaðum goymslumerki, sum skrásetir temperatur og dýpi fleiri ferðir um dagin. Út frá dýpinum ber til at meta um, hvussu toskurin hevur ferðast eftir landgrunninum.

Mynd 1 og 2 vísa ferðingina frá Vágahavinum til Suðuroyarbankan. Longu 11/4 var toskurin komin suður á Munkagrunnin (ferðast 50 fjórðingar). Ferðin hevur tá ligið um góðar 2 fjórðingar um dagin. Síðan fór hann norðureftir og 15/4 var hann komin í áraka Suðuroyarbanka. Ferðin hevur tá verið umleið 5 fjórðingar um dagin (20 fjórðingar í 4 dagar). Hann setti síðan ferðina upp á umleið 8 fjórðingar um dagin og var longu 17/4 komin yvir um dýpið og upp á sjálvan Suðuroyarbankan (12 fjórðingar í 1,5 dagar). Restina av tíðini var hann støðufastur á Suðuroyarbankanum. Hann fór ongantíð upp í sjógvin at sveima, men helt seg trúliga niðri við botnin alla tíðina. Tað skal tó viðmerkjast, at beint eftir merking fer toskur ofta upp í sjógvin at sveima um náttina, men tað heldur uppat eftir 1-2 vikum.

Tað tykist ikki vera nakar "slingur í valsinum": Toskurin stevndi miðvíst móti Suðuroyarbankanum, eftir at gýtingin var liðug. Tað sær út til, at toskurin kendi væl vegin hagar, tí tað eru eingi frávik frá leiðini (ongantíð vilstur). Vit síggja eisini, at hann ikki fór stytstu leið gjøgnum Suðuroyarfjørð (millum Suðuroynna og Sandoynna) og út á Suðuroyarbankan. Toskurin helt seg heldur til umleið sama dýpi meðan hann ferðaðist, sjálvt um tað var ein longri leið.

Tá toskurin var komin upp á pláss, kendi hann seg heima har, tí hann fór ongar staðir. Toskur er eins og seyður, sum gjarna heldur seg til sama hagan. Vit kunnu siga, at hesin toskurin hevði heimstað á Suðuroyarbanka og tað er sera sannlíkt, at hann eisini helt til har, áðrenn hann fór ta longu leið í Vágahavið at gýta. At toskur er støðufastur, hava merkingarroyndirnar við Føroyar týðiliga víst.

Finningarlønin fyri hendan toskin var 300 kr + kilo-prís. Aftur at hesum luttekur hann í dráttinum um 10000 kr, sum verður í oktober. Seinasta freist at lata merkir inn er 27 september.



*Mynd 2 sýnir dýpið, sum toskurin hevur ferðast á*

# Fleiri nýggj frímerki

Postverkið gevur í hesum døgum røð av nýggjum frímerkjum út.

Tað eru tvey motivir, sum eru í fokus í hesum. Tær báðar kirkjurnar á Tvøroyri og í Vági mynda hvør sítt frímerki. Tað er J. P. Gregoriussen, sum hevur sniðgivið merkini. Og síðani er ein røð við átta frímerkjum ognað skaldinum, Janusi Djurhuus og yrkingum hansara. Myndirnar á hesum hevur Anker Eli Petersen gjørt.



*Anker Eli Petersen hevur teknað frímerkjarøð við yrkingunum hjá Janusi Djurhuus sum tema*



*Kirkjurnar í Vági og á Tvøroyri eru á hvør sínum merki*

# Ingálvur á Statens Museum


*Hesin málningur skal nú hanga hjá Statens Museum for Kunst*

LIST
*Tíðindaskriv*

Statens Museum for Kunst hevur ognað sær oljumálning av Ingálvi av Reyni. Málningurin er 250 x 380 cm og ber danska heitið "Vildbrænding, hærgende storm".

Fyri Ingálv av Reyni er hetta ein stórur heiður og viðurkenning og eisini fyri føroyska list sum heild.



# Eydnaðist at fáa vágbingar av húsum

**– Ommur, abbar, foreldur, børn og barnavognar, og ein hundur, vóru við í fyrstu fólkaheilsurenningini í Vági**

HEILSURENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*Eini 55 fólk vóru við til fyrsta túrin í fólkaheilsuverkætlanini í Vági. Her eru tey vesturin á dráttinum á Eiðinum*

Sigast kann ikki annað enn at fyrsta fólkaheilsurenningin í Vági í vetur, fekk stak góða undirtøku.

Eini 55 fólk vóru farin av húsum og tað er rættiliga nógv, tá ið hugsað verður um fólkatalið.

Í fólkaheilsurenningini í Havn vóru útvið 600 fólk, so eftir fólkatalinum var undirtøkan í Vági væl betri. Nú skal eisini sigast, at veðrið var av tí besta og tað hevur helst ikki minkað um áhugan.

Og tað var ein fjølbroytt fjøld sum legði frá landi á Kunningarstovuni í Vági klokkan 19 mikukvøldið og helt vestur ígjøgnum bygdina.

Har vóru ommur og abbar, foreldrur við børnum og barnavognum ungfólk og enntá ein hundur, var eisini við.

Tey flestu gingu, onkur rann og nøkur súkklaðu.

Tað var týðiligt, at fólk hugnaðu sær ófört. Har vóru nógv fólk, sum kanska ikki hitttast so oftaog tey nýttu høvi til at fáa eitt prát Tey gingu vestur ígjøgnum bygdina, tvørturum sandin, niðan til varda verkstaðin og síðani vestur eftir vegnum, framvið Vatninum og vestur á Eiði og so heimaftur.

Undan túrinum, greiddi Sirið Stenberg, heilsufrøðingur heilt stutt frá, hvussu umráðandi tað er at røra seg.

Hon visti at siga, tann, sum rørir seg hvønn dag, kann vænta at fáa 10 góð ár eyka í lívinum. Umframt at liva betri, eru tey seinastu árini hjá teinum, sum røra seg, eisini merkt av, at tey liva nógv betri tey seinastu árini enn tey óvirknu gera. Og tað skal ikki øll verðin til. Einar 20 minuttir um dagin av likamsrørslu er nóg mikið.

Somuleiðis nevndi hon, hvussu umráðandi tað er at eta nógv grønt, at halda seg frá tubakki og at vera varin við sterkum løgi.

Hetta slagið av fólkaheilsirenning, er eitt tiltak, sum Kunningarstovan í Vági fer at skipa fyri hvørja viku fram til jóla.

Endamálið er at ger likamliga rørslu til ein fastan tátt í gerandisdegnum.

Hvørt mikukvøld klokkan sjey verður sostatt skipa fyri útferð av Kunningarstovuni í Vági, har fólk kunnu ganga, renna ella súkkla, hvat ið nú teimum dámar best. Tað verður bara farið innanbíggja í Vági, so tað skal nógv til, áðrenn túrurin verður avlýstur fyri veður.

Men hvønn leygardag klokkan 14, verða grindabátarnir flotaðir og tá fer at bera til hjá ungum sum gomlum, konufólki og mannfólki, at royna seg við ár í hendi. Men tá verða veður og vindur avgerðandi fyri, um farið verður, hvagar farið verður og hvussu langur túrurin verður.

Á Johannustevnuni í Vàgi leygadagin verða teir flotaðir fyrstu ferð.

Harafturat verður skipað fyri longri gongutúri eftir varðagøtunum eina ferð um mánaðin.Alt hetta veðrur lýst seinni.

Tað er ókeypis hjá fólki at vera við í hesum fólkaheilsutiltakinum í Vági.

# Bjóðar seg fram einaferð afturat

**Levi Niclasen, borgarstjóri í Hvalba seinastu árini, er fúsur at taka eitt tørn afturat**

BYGDARÁÐSVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Levi Niclasen, borgarstjóri í Hvalba, hevur ikki fingið nóg mikið av kommunalpolitikk enn.

Hann sigur, at hann ætlar at stilla uppaftur, nú kommunuval verður í november.

Levi Niclasen sat eitt skifti í bygdaráðnum í sjeytiárunum sum varamaður, men í 1992 varð hann beinleiðis valdur. Og hann kom beint í eldin, tí hann gjørdust borgarstjóri beinanvegin.

Eftir valið í 1996 gjørdust Jens Norðberg borgarstjóri, men hann sat bara nakrar mánaðir, so doyði hann brádliga og tá gjørdust Levi Niclsen aftur borgmeistari. Og tað hevur hann verið síðani.

Sostatt hevur hann verið borgarstjóri í 11 ár tilsamans.

Tey seinastu valini hevur Levi Niclasen verið burturúr fyrst valdi bygdaráðslimur í Hvalba.

# Suðurrás aftur í luftina

**Suðuroy:** Í vetur fer Útvarp Føroya aftur at hava eina fasta sending úr Suðuroy einaferð um vikuna.

Tað er sendingin, Viðurgerði, sum verður á skránni hjá útvarpinum hvønn mánadag.

Sendingin verður gjørd á Suðurrás, sum er útvarpsstøðin í Suðuroy, men tað er útvarpið sum sendir sendingina.

Seinasta vetur var Viðurgerði fastur táttur í vetrarskránni hjá útvarpinum og tað verður tað sostatt aftur í vetur.

Sendingin í vetur verður eftir nøkunlunda sama leisti sum í fjørð, tvs. at har verður prát um ymisk viðurskifti, sum eru uppi í Suðuroy, tónleikur o. a.

Í fyrstu sendingini fara tey helst at gera nakað burturúr Johannustevnuni, sum verður hetta vikuskifti og tey fara eisini at ringja til onkran at práta um ymisk viðurskifti.

-àki-

# Porkenning ar fáa gøtunøvn

**Porkeri:** Nú er ætlanin at allir vegir og allar gøtur í Porkeri skulu fáa nøvn.

Bygdaráðið setti herfyri eina nevnd at gera uppskot til gøtunøvn í Porkeri.

Nevndin hevur síðani gjørt uppskot til, hvussu vegir og gøtur skulu nevnast og á bygdaráðsfundi mikukvøldið samtykti bygdarráðið uppskotini.

Men samtyktin er ikki endalig, tí uppskotini skulu nú sendast í hvørt hús í Porkeri so at eisini vanligi borgarin sleppur at siga sína hugsan.

Fólk fáa sostatt høvi til at senda bygdarráðnum, hvat tey halda um nøvnini og um tey halda, at okkurt skuldi verið nevnt øðrvísi.

Tá ið viðmerkingarnar frá porkenningum eru innkomnar og viðgjørdar, fer Bygdarráðið endaliga at samtykkja, hvussu gøtur og vegir í Porkeri skulu nevnast.

Nøkur av nøvnunum, sum gøtunavnanevndin hevur skotið upp at brúka í Porkeri, eru Mýrdalsvegur, Gjáarvegur, Klovavegur, Skiparavegur, Bakkavegur, Deildarvegur, Brekkuvegur og Nøkursvegur, Heygavegur, Hólabrekkan, Mattasarvegur og Fløttavegur.

-áki-